

*Alt bendir á, at Hans Mortensen verður nýggjur formaður í Smyril Line*

# Hans formaður

**Tað er mest sannlíkt, at Hans Mortensen verður nýggjur formaður í Smyril Line**

FORMANSVAL
*Heri á Rógvi*

Tá Sosialurin fór til prentingar hósdagin, hevði nevndin í Smyril Line ikki skipað seg enn. Men alt bendir á, at formaðurin verður Hans Mortensen, stjóri og partaeigari í SMS. Tormóður Djurhus, fráfarandi formaður sigur, at tað er ein avtala millum partaeigararnar, at formaðurin skal vera úr Føroyum. Tað er ikki, sum vit skrivaðu í gjár, felt í viðtøkurnar, at formaðurin skal vera búsitandi í Føroyum, men heldur ein innanhýsis avtala.

Tískil kann tað bert vera Hans Mortensen ella Klæmint Weihe, sum eru føroysku nevndarlimirnir í Smyril Line.

Klæmint Weihe sigur við Sosialin, at hann ynskir ikki at gerast formaður.

Tá vit tosaðu við Hans Mortensen hósmorgunin, segði hann, at tað var sannlíkt, at hann fór at gerast formaður, men einki var vist.

# Einmælt løgting reisir seg ímóti stjórnini

**Tað kemur til skarpskeringar millum donsku stjórnina og Føroya løgting. Eitt samt løgting krevur nú, at hernaðarlógirnar, sum danska stjórnin av sínum eintingum hevur løst fyri Føroyar, verða tiknar av aftur beinanvegin**

HERNAÐARMÁL
*Ingi Rasmussen*

Allir flokkar á løgtingi taka undir við uppskotinum hjá Javnaðarflokkinum um at avtaka hernaðarlógirnar, sum danska stjórnin hevur sett í gildi fyri Føroyar.

Tað vísir álitið, sum Rættarnevnd løgtingsins hevur lagt fyri løgtingið.

Allir flokkar taka undir við uppskotinum, sum hevur til endamáls at strika allar tær lógir og kunngerðir, sum ríkisumboðið hevur lýst í kunngerðarblaðnum B tann 27. mars, uttan at leggja tær fyri løgtingið til álitis.

Men hóast alt løgtingið fer at atkvøða fyri uppskotinum og harvið biða danskar myndugleikar um at taka lógirnar og kunngerðirnar, sum viðvíkja hervaldinum í Føroyum avaftur, so finst andstøðan at løgmanni í málinum.



*Hann, ið tegir, hann samtykkir, sigur Kristian Magnussen, sum er maðurin aftan fyri uppskotið at taka hernaðarlógirnar av aftur, sum danska stjórnin hevur løst fyri Føroyar.*

### Lág raðfesting

Kristian Magnussen úr Javnaðarflokkinum sigur, at landsstðrið als ikki hevur givið málinum ta raðfesting, sum tað hevur uppiborið. Sipað verður til, at løgmaður er kunnaður um málið, sum skjøl í málinum eisini vísa.

– Løgmaður hevur við einki givið til kennar yvir fyri donsku myndugleikunum, at føroyingar í roynd og veru ongar viðmerkingar hava til, at allar hesar lógir og kunngerðir vórðu settar í gildi. Hann, ið tegir, hann samtykkir. Hetta tykist at hava verið galdandi í hesum máli, og tí er spurningurin, um løgmaður hevur røkt okkara áhugamál á ein fullgóðan hátt, sigur Kristian Magnussen.

### Passivt

Sambandsumboðini í Rættarnevndini taka eisini undir við uppskotinum. Men Heðin Mortensen og Bárður Nielsen finnast eisini hvassliga at løgmanni.

– Í staðin fyri at mótmæla ella gera vart við hesa ætlan er landsstðrið passivt og rættir ikki hond frá síðu ella kunnar donsku myndugleikanar um Føroya støðu í tílíkum málum, siga teir báðir.

Sambandsflokkurin vísir á, at løgmaður var kunnaður meira enn einaferð um, at danskir myndugleikar ætlaðu at seta stóra lógarkompleksið í gildi fyri hervaldið í Føroyum.

– Hví hevur so løgmaður ikki mótmælt ella kunnað Løgtingið og danska verju málaráðharran um sína støðu? Sambandsflokkurin átalar harðliga klossutu framferð løgmans í hesum máli og heldur hana harumframt vera ósømiliga. Men av prinsippiellum orsøkum tekur Sambandsflokkurin tó undir við málinum, siga Heðin Mortensen og Bárður Nielsen.

Hava tygum tørv á einum bili í nakrar tímar, dagar ella longur, er skilagott at leiga, heldur enn eiga!
Setið tygum í samband við okkum,
- tað loysir seg!!
AVIS BILÚTLEIGAN
Staravegur 1, Tórshavn, tlf. 217 535 / 313 535
Flogvøllurin: tlf. 212 765 /358 800
Teldupostur: avis@post.olivant.fo






# Sambandið nógv størst

**Sambandsflokkurin er nógv størsti flokkur við 30,6% í nýggjari veljarakanning**

VELJARAKANNING
*Heri á Rógvi*

Ein nýggj veljarakanning, sum Gallup Føroyar hevur gjørt fyri Ùtvarp Føroya, gevur Sambandsflokkinum 30,6%.

Var val í dag vildi Sambandsflokkurin fingið tíggju tingmenn. Hetta eru tveir meira, enn flokkurin hevur í dag. Sambandsflokkurin hevur ligið fremst í veljarakanningunum síðani valið, men munurin hevur ikki verið so stórur sum nú.

Javnaðarflokkurin fær 22,1% í veljarakanningini og átta tingmenn – ein meira enn verandi tingmannatal. Hetta gevur verandi andstøðu ein meirluta. Tjóðveldisflokkurin fær í kanningini 22,3% og átta tingmenn.

Fólkaflokkurin missir ein tingmann sambært kanningini og fær seks - 18,9%.

Hvørki Sjálvstýrisflokkurin ella Miðflokkurin sleppa sambært kanningini á ting.

Miðflokkurin fær bert 2,8%, og Sjálvstýrisflokkurin megnar at fáa 3,4%. Tað krevst 3,7% av atkvøðunum til at sleppa á ting.

Ein kanning er bert ein kanning, og var val veruliga, so hevði úrslitið óivað verið øðrvísi. Men nýta vit kanningina til at siga okkum ein tendens, so hevur andstøðan ein greiðan mun móti samgonguni. Trupulleikin er bert tann, at slíkar veljarakanningar í stóran mun ikki leggja upp fyri valdømisskipanini í Føroyum, og teir ymsu tendensir kring landið eru ringir at rokna við.



*Sambært feskastu veljarakanningini velja føroyingar heldur Listbeth enn Høgna – samband fram um loysing.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Anfinn mest

Í kanningini, sum Gallup hevur gjørt fyri Ùtvarp Føroya, verða tey gott fimmhundrað fólkini eisini spurd, hvønn tey kundu hugsað sær sum Føroya løgmann.

Sum vanligt hevur veriðs seinastu nógvu veljarakanningarnar, so er Anfinn Kallsberg nógv best umtóktur.

Í hesari kanningini fær hann 39%. Høgni Hoydal, varaløgmaður, fær undirtøku frá tíggju prosentum. Samanlagt gevur hetta 49%, og tað er meira enn samgonguflokkarnir fáa frá veljarunum.

Jóannes Eidesgaard halda 16% vera besta egnaðan sum løgmann, og Lisbeth L. Petersen siga 18% gott fyri. Hetta er meira, enn Lisbeth L. Petersen áður hevur fingið. Hetta er samstundis eisini fyrstu ferð, at hon fær størri undirtøku enn Jóannes Eidesgaard til løgmansembæti.

Sjálv sigur Lisbeth L. Petersen, at hon fegnast um kanningina – bæði persónliga og fyri flokkin.

– Hetta vísir týðuliga, at tað er ein tendensur. Eg haldi eisini, at hetta sigur okkum, at okkara politikkur er tann rætti, sigur Lisbeth L. Petersen.

### Nógvar kanningar

Sum vera man við einari tílíkari veljarakanning, fáa allir flokkar tað at ljóða sum um, at hetta er gott úrslit fyri teir, ella at kanningin gevur eina skeiva mynd.

Hetta er tann tólvta veljarakanningin hjá Gallup síðani valið fyri einum ári síðani. Úrslitið hava verið nakað svingangandi.

Sambandsflokkurin hevur allatíðina verið størstur, og teir smáu flokkarnir hava ligið bæði uttanfyri og innanfyri markið, har serliga Sjálvstýrisflokkurin hevur havt tað trupult.

Tað eru teir smáu flokkarnir, sum hava verið avgerandi fyri, hvørt samgongan – í veljarakanningunum – hevur hildið meirilutan.å

# Setningurin er rokkin

**Tórmóður Djurhuus ynskti ikki at halda fram sum nevndarformaður í Smyri Line. Setningurin er rokkin, sigur hann**

NEVNDARVAL
*Heri á Rógvi*

Á aðalfundi í vikuni fór Tórmóður Djurhuus, advokatur, frá sum nevndarformaður fyri Smyril Line. Hann hevur verið formaður, síðani Framtaksgrunnurin setti pengar á vári 2001 saman við øðrum.

Formaðurin í nevndini skal hava fastan bústað í Føroyum, og Tórmóður gjørdist millum annað tí formaður umboðandi Framtaksgrunn Føroya.
Tórmóður sigur, at dentur varð lagdur á, um hann kundi vera nevndarformaður, meðan nýggja Norrøna varð bygd í Lübeck.

– Hesum játtaði eg. Setningurin, sum eg segði ja til, er nú rokkin. Og hetta er orsøkin til, at eg mynstri av, sigur Tormóður Djurhuus, sum í sínum dagliga yrki sum advokatur hevur savnað sær hópin av royndum seinastu árini.

Á aðalfundinum nýtti Tormóður høvi til at takka fyri samstarvið. Hann helt fyri, at uppgávan hevði verið bæði torfør, stressandi og spennandi.



*Tormóður Djurhuus metir, at hansara setningurin sum nevndarformaður fyri Smyril Line er náddur*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*

Hetta er størsta verkætlanin, ið Tormóður hevur tikið lut í, og tað er samstundis eisini størsta einstaka verkætlanin í Føroya søgu. Hetta hevur eisini verið við til at gjørt uppgávuna avbjóðandi og spennandi, heldur Tormóður.

– Eg havi ikki ynskt at mynstra til nýggjan túr, men tankarnir eru sjálvandi innanborða hjá teimum á Smyril Line. Har ber tað neyvan til at taka sær av løttum, tí sum vituligt er, so er nógv at forsvara við nýggjum skipi, sigur Tormóður Djurhuus.

Hann letur kortini onga iva vera um, at hann trýr upp á, at tað ber til við nýggju Norrønu.

# 191 milliónir í yvirskoti

**Landsroknskapurin vísti eitt yvirskot áljóðandi 191 milliónir fyri 2002. Hetta eru 506 milliónir minni enn í 2001**

ROKNSKAPUR
*Heri á Rógvi*

Tað var ein errin landsstýrismaður í fíggjarmálum, sum hósmorgunin legði landsroknskapin fyri 2002 fram saman við Leif Abrahamsen, stjóra á Føroya Gjaldstovu.

Roknskapurin vísir eitt yvirskot áljóðandi 191 milliónir krónur. Hetta er rakstrar, løgu- og útlánsúrslitið (RLÙ). Hetta er væl minni enn undanfarin ár. Frá 1999 til 2001 hevur yvirskotið verið omanfyri sekshundrað milliónir. Orsøkin til fallið er serliga minkaði blokkstuðulin.

Avdráttirnir í 2002 vóru 144 milliónir, og landið hevði tá avtornaði 124 milliónir afturat í tøkum peningi.

Inntøkurnar hjá landskassanum vóru í 2002 3,973 milliardir, og útreiðslurnar vóru 3,542 milliardir. Íløgurnar vóru 240 milliónir.



*Yvirskotið hjá landskassanum minkaði við 506 milliónum í 2002 í mun til 2001. Àrsúrslitið fyri 2002 var 191 milliónir í yvirskoti*
*Mynd: Àlvur Haraldsen*

Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, visti at siga, at hóast inntøkurnar og útreiðslurnar nærkast hvørjum øðrum, so fer 2003 at geva eitt eins gott ella betri úrslit sum í 2002.

Lesið meira um landsroknskapin í Sosialinum í morgin.